# Quiz

**1** *Hvussu eitur mannligi tennisspælarin, sum júst hevur vunnið kappingina US Open?*

**2** Næstu vikurnar skal ein útlendsk ferja avloysa Smyril á Suðuroyarfarleiðini. *Hvussu eitur avloysaraferjan?*

**3** Farna vikuskiftið fekk Føroya Lærarafelag nýggjan formann. *Hvussu eitur nýggi formaðurin?*

**4** *Hvussu eitur nýggi formaðurin fyri høvuðsstýrið hjá Kirkjuligu Heimamissiónini?*

**5** *Hvussu eita nýggju venjararnir hjá HB?*

**6** Smyril Line hevur sett nýggjan stjóra. Virkandi stjórin seinastu tíðina er nú settur fast í starvið. *Hvussu eitur hann?*

**7** *Hvussu eitur sjónvarpsmaðurin, sum ger sendingina Frætt og Fregnað?*

**8** Blaðið Kvinna hevur fingið nýggjan blaðstjóra. *Hvussu eitur hon?*

**9** Ein drotning hevur nú um dagarnar vitja í Havn, uttan at fólk veruliga góvu sær far um tað. *Úr hvørjum landi var drotningin?*

**10** Heimasíðan elin.fo gevur ráð og upplýsing um kynslív. *Hvussu eitur kvinnan, sum rekur hesa heimasíðu?*

**1-4** Ikki nóg gott
**5-7** Tú fylgir hampuliga væl við
**8-9** Tú fært tað mesta við
**10** Veist tú alt?

**SVAR**

*1. Rafael Nadal, 2. Regina Baltica, 3. Herálvur Jacobsen, 4. Bergur Debes Joensen, 5. Julian Hansen og Hallur Danielsen, 6. Rúni Vang Poulsen, 7. Tórður Mikkelsen, 8. Barbara á Tjaldrafløtti, 9. Belgia og 10. Elin í Stórustovu*

**10 TING** UM Medina

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Medina er heit

HON ER FREMSTA **POPPNAVNIÐ** Í DANMARK Í LØTUNI OG ER VIÐ AT RØKKA ÚT UM **LANDODDARNAR**.

**1** Andrea Fuentealba Valbak var fødd í Århus-forstaðnum Risskov og er 27 ára gomul.

**2** Í 2005 broytti hon navn til Medina Danielle Oona Valbak, eftir at hon hevði verið hjá einum numerologi.

**3** Mamma Medina er donsk, pápin er ættaður úr Kili.

**4** Medina hevur ein 5 ár eldri beiggja og eina systur, sum er 9 ár yngri enn hon.

**5** Áðrenn hon fekk gjøgnumbrot sum tónleikari, arbeiddi hon í eini sandwichbarr í Århus

Stóra gjøgnumbrotið fekk Medina við útgávuni Kun For

**6** Mig, sum kom í 2008. Útgávan var á hitlistanum í 52 vikur – har av seks vikur ovast.

**7** Í 2009 var hon mest seljandi danski tónleikarin

**8** Medina roynir nú at vinna fram uttanfyri Danmark – eitt nú í Bretlandi og Týsklandi

**9** Hon hevur tikið skeið í klædnadesigni og forvann eitt skifti pengar við at seyma klæði til onnur.

**10** Medina hevur síðani februar í ár hildið saman við dansaranum og sjónleikaranum Mathias Arvedsen.

## SITAT



At liva lívið er sjáldsamt.
Flestu fólk eru bara til.

***Oscar Wilde***
*írskur rithøvundur*